

*– Vilt tú spyrja onkran fremmandan um okkurt á Oyrasundi, so spyrt tú fyrst á føroyskum. Riggar tað ikki, royn so á enskum og at enda á donskum, siga nakrir av føroyingunum, sum búgva á Oyrasunds kollegiinum á Amager.*
*Mynd: Rólant Waag Dam*

## Eg søkti bara Oyrasund. Tað var ikki eitt must, at tað skuldi vera tað, men har búðu øll hini, sum eg kendi tá

at verða avbyrgdur frá dønum, men eisini føroyingum, sum búgva aðrastaðni.

Sum dømi nevnir Heini, tá teir fara at spæla fótbólt á lítla asfaltvøllinum í garðinum.

– Tá eru vit bara føroyingar, sum búgva her. Eg haldi meg hava eini 60 nummur, sum eg kann ringja til á kollegiinum, fyri at manna lið. Men eingin okkara kundi funnið uppá, at fingið onnur fólk, sum búgva beint við kollegie, upp í part, tí tey eru onkursvegna uttanfyri, sigur Heini meðan hann flennir at støðuni.

Súsanna greiðir somuleiðis frá, at ynskja tey at vitja fólk, so er lættasta loysnin at vitja fólk á kollegiinum.

– Ikki minst tá vit hava børn, tí so sleppa vit frá at lata Miriam í og kunnu ganga í inniskóm yvir til vinfólkini, sigur hon.

### Føroysk ávirkan

Júst hetta, at tað er so lætt og ómakasleyst at detta inn á gólvið hvør hjá øðrum, er eisini við at gera uttanfyri kollegiið koma við børnum sínum.

### Avmarkað privatlív

Men mongu føroyingarnir merkja eisini, at tað er ógvuliga trupult at liva eitt lív, har eingin leggur merki til tín og tað, tú gert. Føroyingar eru jú allastaðni kring teg.

– Allir okkara nærmastu grannir eru føroyingar. Yvirbúgvin, undirbúgvin, grannin til høgru og grannin til vinstru. Øll eru føroyingar, flennir Ella, meðan Helgi leggur aftrat, at privatlívið er ógvuliga avmarkað á Oyrasundi.

– Tað ber ikki til, at hava nakað privatlív. Her kanst tú ikki goyma teg og øll vita, hvat tú gert, sigur hann. Helgi er tó skjótur at leggja aftrat, at tíðin á Oyrasundi ivaleyst er einasta tíðarskeiðið í lívinum, har tú kemur at liva so tætt upp at so nógvum fólkum, sum tú kennir.

Tí snýr tað seg um at njóta Oyrasund við øllum sínum fyrimunum, og so annars bera yvir við restini, meðan tú býrt har.

*rolant@sosialurin.fo*

## Allir okkara nærmastu grannir eru føroyingar. Yvirbúgvin, undirbúgvin, grannin til høgru og grannin til vinstru

Oyrasundskollegie so sjarmerandi. Drekkamunns-mentannin er í hásætinum og fólk ganga bara inn hjá hvørjum øðrum.

Og mongu føroyingarnir hava eisini sett sín dám á kollegie á annan hátt. Í grillbarrini fært tú nú soya til kipsini. Tað er annars ikki vanligt, men ein dagin fyri nøkrum árum síðani hevði ein føroyingur fingið nokk av kipsum uttan soya. So hann gjørdi ikki mætari enn at geva fólkunum í grillbarrini eina fløsku av soya við boðunum um, at so leingi føroyingar búðu á Oyrasundi, skuldu tey altíð hava soya til kipsini.

Eitt annað dømi um føroysku ávirkanina, er sunnudagsskúlin, sum Heini og Súsanna skipa fyri á kollegiinum hvønn sunnumorgun. Hesin savnar eina rúgvu av føroyskum børnum, og eisini foreldur

### FAKTA:

**Súsanna Kass Kristiansen og Heini Kristiansen**
25 og 24 ára gomul og eiga tvey ára gomlu dóttrina Miriam
Nes og Skála
Súsanna lesur til farmaseut og Heini á CBS
Búð á Oyrasundi síðani 2008

**Ella Joensen**
24 ár
Kollafjørður
Lesur lívfrøði og ítrótt
Búð á Oyrasundi síðani 2010

**Helgi Justinussen**
29 ár
Havn
Lesur á CBS
Búð á Oyrasundi síðani 2004